**Fjølmiðlanevndin**

c/o Føroyar Kærustovnur
Undir Hornabakka
Postboks 45
FO-110 Tórshavn

**Tórshavn, 31. oktober 2016**

Journal nr :
Okkara ref. :
Tykkara ref. :

Stjórnarskrivstovan

Eik Banki P/F
Yviri við Strond 2
Postboks 34
FO-110 Tórshavn

Tel.: 348000
Fax.: 348800

office@eik.fo
www.eik.fo

Swift: EIKB FO TF
Pf. skr. nr.: 5534

**Viðmerkingar til aftursvar frá Kringvarp Føroya upp á kæru frá Eik Banka.**

Avrit frá kvf.fo

Eik Banki skal við hesum geva sínar viðmerkingar til aftursvarið frá Kringvarp Føroya ("KvF") uppá kæruna frá Eik Banka.

KvF hevur í sínum svarskrivið til Fjølmiðlanevndina ongar nýggjar viðmerkingar til kæruna frá Eik Banka, men velur heldur at halda fast í sínum upprunaliga svarskrivið til Eik Banka. Tískil skal Eik Banki gera sínar viðmerkingar til málið, við vón um at hetta kann vera viðvirkandi til at greiða teir misskiljingar, sum KvF hevur um hetta mál, og sum KvF, tíanverri, hevur valt at miðla út til Føroya fólk.

Viðmerkingarnar eru drúgvar, men hetta verður mett sum neyðugt, fyri at lýsa málið best møguligt.

## MÁLSLÝSING

Skattamálið hjá Eik, sum tað í KvF og hinum fjølmiðlunum er doypt, viðvíkur í stuttum hvørt Eik Banki hevur rætt til ein skattafrádrátt í samband við at ein undirbalansa varð staðfest eftir yvirtøkuna av gamla Eik Banka. Fjølmiðlarnir, serliga KvF og Sosialurin, hava roynt at fingið hetta mál at snúgva seg um hvørt Eik Banki hevur roynt at snýta og/ella villeiða TAKS. Uppáhald, sum KvF einki grundarlag hevur fyri at bera fram.

Eftir eina eftirlitsvitjan um miðjan september 2010 ásetti Fíggjareftirlitið nýtt solvenskrav fyri gamla Eik Banka. Tá ið solvenskravið ikki var uppfylt innan ásettu freistina, sum var tann 30. september 2010, varð avtala gjørd sama dag, tvs. 30. sept. 2010, við Finansiel Stabilitet, um at avhenda virksemið í gamla Eik Banka til eitt nýstovna dóttirfelag hjá Finansiel Stabilitet. Avhendanin varð gjøgnumførd við at Finansiel Stabilitet tann 14. oktober 2010 stovnaði dóttirfelagið, Eik Banki Føroyar P/F, við einum kontantum innskoti á kr. 2 mia. Jørn Astrup Hansen tók við sum fyrsti stjórin í nýggja Eik Banka.

Í samband við yvirtøkuna varð gjørdur ein byrjunarjavni pr. 1. oktober 2010 (hjálgdur sum **Fylgiskjal 1**) við einum javna uppá kr. 13,5 mia. og einum eginpeningi á kr. 2 mia., sum svarar til kontanta innskotið nevnt omanfyri.

Í tíðarskeiðnum 1. oktober 2010 til 1. februar 2011 staðfesti nýggi Eik Banki virðistap, sum m.a. var orsaka av at summar av bankans ognum vórðu seldar við tapi, og summi útlán vórðu mett at hava eitt lægri virði enn upprunaliga mett. Tískil var neyðugt hjá nýggja Eik Banka at gera niðurskrivingar. Hesar niðurskrivingar vórðu reguleraðar yvir eginognina, sum harvið minkaði við ca. kr. 500 mió. Sum **Fylgiskjal 2** verður hjálagt javnin hjá nýggja Eik Banka pr. 1. februar 2011.

Byrjunarjavnin, sum í **Fylgiskjal 1** ber heiti "Preliminary Opening Balance", verður av KvF (og Jørn Astrup Hansen) róptur fyri "den præliminære åbningsbalance", og javnin í **Fylgiskjalið 2** verður róptur "den endelige åbningsbalance". Hetta er misvísandi, tí at hetta bendir á ein samanhang millum hesi skjølini, sum grundarlag ikki er fyri. Omanfyri nevndu reguleringar vórðu nevnliga bókaðar beinleiðs á eginognina, og ikki sum rætting til yvirtiknu ognirnar og skuldina, sum tær annars skuldu havt verði, um talan var um eina "præliminæra" og "endaliga" byrjunarjavna.

Tann 13. februar 2011 varð ein treyta yvirtøkuavtala gjørd millum Finansiel Stabilitet og TF Holding um sølu av 70 % av partabrøvunum í Eik Banka. Avtalan var m.a. treyta av myndugleikagóðkenning í Føroyum og Danmark, og eftir at loyvi var givið, varð avtalan endaliga gjøgnumførd tann 6. apríl 2011. Jørn Astrup Hansen fór samstundis frá sum stjóri í nýggja Eik Banka, og tók sess í nevnd bankans sum umboð fyri Finansiel Stabilitet.

TF Holding fekk undir samráðingunum við Finansiel Stabilitet í 2011, hjálp frá danska grannskoðarvirkinum Deloitte, sum vísti á at virðistapið á tær stívliga kr. 500 mió. var frádráttarbært skattliga.

Fyrsta sjálvuppgáva bankans varð latin inn í juni 2012. Millum annað grunda á ráðgevingina frá Deloitte, metti leiðslan í Eik Banka seg hava rætt til ein skattafrádrátt uppá uml. kr. 500 mió. Hesin frádráttur varð tískil tikin við í sjálvuppgávuni við einari viðmerking um hetta.

Í samband við viðgerð av ársroknskapinum fyri 2012, sum var tann roknskapurin har skattafrádrátturin skuldi "aktiverast, sum tað eitur, segði ein av táverandi grannskoðarum bankans, Henrik Barner frá KPMG, á einum fundi í bankans grannskoðanarnevnd, at "*det danske skattevæsen ikke accepterer, at det skattemæssige tab optages i primo-balancen i en lignende situation, men [han] var enig i, at banken i den færøske indkomstopgørelse havde foretaget et fradrag for udgifterne i forbindelse med selvangivelsen for 2011."* Hvørki nevnd ella grannskoðan ella nakrar annar hevði nakra viðmerking til hetta.

Tann 15. mei 2013 sendi SPEKT, ið tá var vorðin einsamallur grannskoðari í Eik Banka, eitt upprit til nevnd bankans. Í hesum uppritið sigur SPEKT seg vera í iva um, hvørt bankin hevur rætt til at taka tær uml. kr. 500 mió. sum ein beinleiðis frádrátt, men at virðistapið møguliga kundi viðgerast sum skattligur goodwill og harvið avskrivast yvir 10 ár. SPEKT ráddi til, at Eik Banki sendi TAKS ein fyrispurning um hetta, so at TAKS kundi avgera spurningin.

Fyri at beina burtur allan iva, avgjørdi ein samd nevnd í Eik Banka, at senda ein fyrispurning til TAKS. Hesin fyrispurningur varð sendur TAKS tann 11. juni 2013.

Avrit frá kvf.fo

Fyrispurningurin til TAKS var javnan viðgjørdur í nevndini hjá Eik Banka í tí tvey ára tíðarskeiðnum hann var til viðgerar hjá TAKS. Málið varð viðgjørt 6 ferðir í nevndini og 3 ferðir í grannskoðanarnevnd bankans í hesum tíðarskeiðnum.

Í samband við fyrispurningin til TAKS sendi Eik Banki alt viðkomandi tilfar til TAKS, eins og TAKS fekk útflýggjað alt tilfar, sum TAKS bað um. Tað skal serliga viðmerkjast at TAKS fekk báðar hjáløgdu javnarnar.

Tann 30. juni 2015 kom TAKS til ta niðurstøðu, at Eik Banki hevði ikki rætt til at draga virðistapið frá sum ein beinleiðis frádráttur, men at virðistapið kundi viðgerast sum skattligt goodwill og tískil avskrivast yvir 10 ár. Nevndin varð kunna um avgerðina frá TAKS tann 24. august 2015.

Tann 1. desembur 2015 yvirtók TF Holding tey seinastu 30 % av Eik Banka frá Finansiel Stabilitet. Tá Finansiel Stabilitet eftir hetta ikki hevði nakran ognarlut í Eik Banka, og tískil heldur ikki hevði rætt til umboðan í nevnd bankans, skuldi Jørn Astrup Hansen úr nevndini. Hann skuldi tó, eftir ætlan, sita skeiðið út, tvs. fram til aðalfundin 2016.

Tann 11. januar 2016 valdi Jørn Astrup Hansen at taka seg úr nevndini. Grundgevningin hann gav var at hann ikki kundi góðtaka at bankin "aktiveraði" loyvda frádráttin. Hvørki nevnd ella stjórn bankans kendu aftur grundgevingarnar frá Jørn Astrup Hansen, tí at Jørn Astrup Hansen hevði verið við til allar viðgerðir av spurninginum, og tók eisini undir við avgerðini um at senda TAKS fyrispurning. Leiðslan í bankanum valdi tó ikki at gera meiri við hetta.

Seinni í januar 2016 boðaði SPEKT frá, at teir ikki tóku undir við avgerðini hjá TAKS, og tískil vórðu noyddir at taka fyrivarni fyri hesum í ársroknskapinum fyri 2016, um so var at bankin valdi at "aktivera" skattafrádráttin. Eik Banki kann ikki liva við at grannskoðarar bankans taka fyrivarni í roknskapinum, og kann heldur ikki liva við, at ivi verður sáddur um hvørt bankin hevur rætt til ein skattafrádrátt ella ei.

Tískil avgjørdi nevndin í Eik Banka á fundi tann 27. januar 2016 at málið skuldi leggjast fyri TAKS enn einaferð. Stjórnin setti seg tískil í samband við TAKS og beyð teimum til fundar. At Finansiel Stabilitet í sama tíðarskeiðið sendir Fíggjarmálaráðnum, og harvið TAKS, avrit av skrivinum hjá Jørn Astrup Hansen til nevndina, hevur sum so einki við nakað at gera. Meiningarnar hjá Jørn Astrup Hansen hava einki grundarlag og ongan týdning í samband við myndugleikaviðgerðina av hesum málið, tí at Jørn Astrup Hansen er ikki serkønur ella myndugleiki á økinum.

Í februar 2016 hevur Berlingske tvær greinar í blaðnum um málið, eins og nevndarformaðurin í Eik Banka, Torben Nielsen, verður interviewaður í TV2-radio. Meiri varð ikki gjørt við málið í donsku miðlunum – nokk tí at donsku miðlarnir sóu, at eingin "søga" var. Føroysku miðlarnir dekkaðu eisini málið sporadiskt um hetta mundið.

Í apríl 2016 valdu KvF og Sosialurin so at fara undir eitt samstarv, har hetta mál skuldi "avdúkast" og lýsast við nýggjum greinum og brotpartum av skjølum fleiri ferðir daliga. Hesin dekningur kulmineraði við sjónvarpssendingini "Skattamálið", ið er eitt samanklipp av eldri tíðindainnsløgum, einari roynd uppá "journalistiska" viðgerð og so við dramatiskum fylgitónleiki.

Avrit frá kvf.fo

Sjálvur skattaspurningurin verður framvegis viðgjørdur av TAKS.

## VIÐMERKINGAR TIL EINSTØKU KLAGUPUNKTINI

Sum nevnt í kæruni hjá Eik Banka til Fjølmiðlanevndina, dagf. 27. september 2016, so heldur Eik Banki fast í øllum sínum upprunaligu kærupunktum, sum KvF átti at havt viðgjørt, men bankin metir tað vera neyðugt, fyri at kærunevndin skal fáa eina so fullfíggjaða mynd av málinum sum til ber, at gera viðmerkingar til tey einstøku punktini. Numrini vísa til numrini, ið KvF nýtir í sínum svarið til Eik Banka.

1 Kæran um hetta punkt, snýr seg ikki um hvørt KvF hevur rætt til at nýta og/ella verja sínar dulnevndu keldur. Tað sum kært verður um, er at útsøgnin hjá dulnevndu kelduni ikki verður eftirkannað í sjónvarpssendingini. Sitatið verður ikki viðgjørt ella nevnt aftur í sendingini.

2 Heldur ikki her viðger KvF kæruna frá Eik Banka, men velur heldur at verja hví forsíðan á Sosialinum verður tikin við. Tá ið KvF endurgevur forsíðuna á Sosialinum, so hevur KvF sjálvstøðuga ábyrgd fyri útsøgnunum á forsíðuni, smb. § 19 í lóg um fjølmiðlaábyrgd. Tískil er endurgevingin av forsíðuni hjá Sosialinum í sendingini, at sammeta við at KvF sigur "Eik lumpaði TAKS". Hesum uppáhaldið hevur KvF einki grundarlag at seta fram, og hetta hvørki kann ella verður skjalprógvað.

Tað er áhugavert at tað eru KvF og Sosialurin, sum gera niðurstøður um at Eik skal hava lumpað TAKS, uttan at TAKS hevur úttalað seg til nevndu miðlar um hendan spurning.

3 Tað er ikki eitt fakta, at tað "eyðnaðist" Eik Banka at "fáa TAKS at játta sær ein skattalætta". Hetta er villleiðandi orðing frá KvF. Eik Banki fekk játta ein skattafrádrátt, tí at TAKS metti Eik Banka hava rætt til ein skattafrádrátt. Orðavalið hjá KvF er enn ein tilætlað roynd at fáa tað at síggja út, sum at Eik Banki "lumpaði" TAKS.

Í sínum svarið til Eik Banka skrivar KvF:
*"Spurningarnir 1) -hvørt Eik Banki hevði rætt til skattafrádráttin, ella 2) -hvørt tað var Eik Banki ella Fíggjarligt Støðufesti, sum hevði havt tapið á eina hálva milliard krónur, vóru als ikki partar av fyrru viðgerðini hjá TAKS".*

Sum grundarlag fyri hesum uppáhaldið vísur KvF til bræv frá Eik Banka til TAKS, tann 24. juni 2013. Tað vil við øðrum orðum siga, at KvF – bert við brævinum frá Eik Banka sum grundarlagið – metir seg kunna siga hvat TAKS hevur viðgjørt og ikki. Hetta svarið frá KvF vísur, at KvF einki atlit tekur til fyrisitingarligar reglur og lóggávu í sínari miðling. Um hetta tilætlað, tí tað passar betri við "søguna" hjá KvF, ella um tað er ókunnleiki, er ilt at siga.

TAKS hevur – sum ovasti skattamyndugleiki í landinum – ikki bert teir valmøguleikar, ið Eik Banki spyr um, men altíð, sum myndugleiki, hevur ein triðja møguleika, sum er at nokta Eik Banka frádráttin. Tað er ikki bert ein møguleiki hjá TAKS; tað er eitt krav sambært fyrisitingarlóggávuni, at um TAKS metir at Eik Banki (ella ein hvør annar) slettis ikki hevur rætt til ein frádrátt, so skal TAKS nokta frádráttin. Um móttakarin er ónøgdur, hevur man møguleika at kæra avgerðina hjá TAKS.

Avrit frá kvf.fo

Eik

Eik Banki hevur aldrin verið í iva um at bankin hevur rætt til ein frádrátt fyri undirbalansuna – antin sum beinleiðis frádrátt ella sum goodwill. Tískil var spurningurin til TAKS hvussu undirbalansan skuldi viðgerast skattliga, og ikki um hvørt bankin hevði rætt til frádrátt. Um so er at TAKS metti at bankin ikki hevði rætt til frádráttin, so hevði TAKS komi til ta niðurstøðuna og boðað bankanum frá hesum – sjálvt um bankin ikki spurdi um hetta.

4 Skjalayvirlitið frá TAKS vísur at málið er stovnað í skipanini hjá TAKS tann 11. februar 2016, og at fyrsta skjalið er skrivið frá Finansiel Stabilitet. Sum Eik Banki hevur víst á, so ringdi Eik Banki til TAKS tann 9. februar 2016, tvs. 2 dagar innan. Hetta er tó detaljur, sum ongan týdning hava. Nevndin í Eik Banka tók avgerð um at senda nýggjan fyrispurning til TAKS longu tann 27. januar 2016, og Eik Banki hevði vent sær til TAKS óansæð um Finansiel Stabilitet hevði sent nakað bræv ella ikki. Tískil hevur hetta ongan týdning.

5 Sí punkt 2.

6 Sí punkt 1. Enn einaferð viðger KvF ikki kæruna, men verjir sín rætt at nýta dulnevndar keldur. Ein rætt, sum Eik Banki aldrin hevur sett spurnaðartekin við.

7 Upplýsingin er skeiv, og svarið frá KvF vísur at KvF ikki til fulnar skilur lóg um finansiel stabilitet og tær mekanismur, sum liggja aftanfyri ein bankayvirtøku.

Hvussu nógv engagement Fíggjareftirlitið var ígjøgnum innan fundin við leiðsluna í gamla Eik Banka hevur ongan týdning. Eitt einstakt engagement kann í veruleikanum vera nokk til at ein banki ikki uppfyllir sítt solvenskrav. Tvs. um Fíggjareftirlitið hevur verið ígjøgnum 10, 15 ella 20 er ikki tað avgerandi. Tað avgerandi er hvørji engagement verður gjøgnumgingin, støddin á hesum engagementum og avgerandi er støddin á teimum meirniðurskrivingum, sum Fíggjareftirlitið krevur.

Eftir at Fíggjareftirlitið hevur verið inni og hevur staðfest at bankin ikki uppfyllir sítt solvenskrav, so kemur Finansiel Stabilitet inn og ger sína egnu uppgerð. Og tað er hendan uppgerð, sum skal liggja til grund fyri yvirtøkuna av tí kollsiglda bankanum, tvs. hendan uppgerð liggur til grund fyri yvirtøkujavnanum. Tískil verður hendan uppgerð endalig, tá ið kollsigldi bankin verður yvirtikin.

Upplýsingin er sostatt skeiv, tí hon gevur eina fatan av at eingin nøktandi uppgerð varð gjørd, og at yvirtøkujavnin nærum var eitt tilvildarligt tal.

8 Finansiel Stabilitet rindaði ikki rokningar "í gamla Eik". Nýggi Eik Banki yvirtók skyldur frá Eik Banka – ikki Finansiel Stabilitet.

Notan í roknskapinum hjá Eik Banka, sum KvF vísur til, hevur einki við "rokningar í gamla Eik" at gera, men sipar til beinleiðis útreiðslur (advokatar, grannskoðarar o.t.), ið stóðust av yvirtøkuni. Hetta er ein lógvarkravd upplýsing, sum hevur til endamáls at vísa kostnaðin, sum er knýttur at sjálvari stovnanini av einum felag. Hetta hevur einki við virðistap at gera.

Avrit frá kvf.fo

Talan er ikki um at Eik Banki hevur misskilt setningin, men heldur um KvF hevur misskilt ella yvirtulkað sítt keldugrundarlag.

9 *”KPMG orðaði skattligu treytir, sum fylgdu við Eik”*. Óansæð hvussu tú skilur ella misskilur ”orðaði”, so er útsøgnin villleiðandi og skeiv. Føroyska skattalóggávan avger hvør skal gjalda hvat í skatti osfr. Tað ber snøgt sagt ikki til at ”orða, nevna, bera ella seta saman” skattligar treytir. Ein yvirtøka kann gerast uppá fleiri mátar, og hvør máti kann hava skattligar avleiðingar.

KPMG hevur ikki í umrødda skjalinum ”sett orð á, hvørjar skattligar treytir vóru galdandi fyri Eik Banka”. Svarið frá KvF er undanførsla. KPMG gjørdi sína meting av hvussu yvirtøkan skuldi viðgerast skattliga. Hvørki meiri ella minni. Ein meting. Hesa meting deila hvørki Eik ella Deloitte, og tískil er hetta lagt fyri TAKS.

10 Eik Banki kærir hvørki fatanina hjá KvF ella metingina hjá KPMG, men kærir at KvF – uttan grundarlag – ger niðurstøðu um hvussu og út frá hvørjum javna skattagrundarlagið hjá Eik Banka skal roknast. Uttan at vísa til eitt einasta fakligt grundarlag – annað enn eitt citat frá KPMG, sum er tikið út úr kontekst.

KvF umsetur í sendingini orðið ”should” til ”skulu”, og KvF endurtekur hesa umsetingina í sínum svarið til Eik Banka. Rætta umsetingin av ”should” í hesum førinum er ”eigur at” og ikki ”skal”. Notatið frá KPMG, sum inniheldur hatta sitatið, er dagfest 15. november 2010, og var lagt í datarúmið og tøkt fyri møguligar keyparar av Eik. KPMG skrivar seinni í sama notatið: *”The transfer of the shares should not affect the tax affairs of the Bank. However, as noted above the terms of the transfer will indirectly impact the tax basis of assets and liabilities.”* Í marts 2011 skrivar KPMG, vísandi til sama notat, *“må det forventes, at de færøske skattemyndigheder vil lægge den endelige regnskabsmæssige åbningsbalance til grund for de skattemæssige indgangsværdier…”*. Orsøkin til at KPMG brúkar ”forventes”, er tí at KPMG veit at ein skattlig undirbalansa er ikki tað sama sum ein roknskaparlig undirbalansa, og í teimum førum skulu skattamyndugleikarnir ikki leggja roknskaparliga javnan til grund. TAKS hevur eisini í skrivinum frá 20. juni 2015 serstakt nevnt, at ein skattlig undirbalansa er ikki tað sama sum ein roknskaparlig undirbalansa.

At eginognin í roknskapinum (sum er gjørdur í 2012) er sett til kr. 1.485 mio. er ikki løgið, tí at bankin hevði havt eitt virðistap uppá kr. 514 mió. í sínum fyrsta roknskaparárið. Og harvið minkaði eginognin frá kr. 2.000 mió. til kr. 1.485 mió. Eitt virðistap, sum var staðfest fram til februar 2011, og sum varð bóka yvir eginognina. Hetta er roknskaparteknikkur og soleiðis sum Finansiel Stabilitet valdi at gera tað. Hetta hevur tó onga ávirkan á rættin til skattafrádrátt ella ei.

11 Í sínum svarið roynir KvF enn einaferð at loypa á Eik Banka, heldur enn at viðgera kæruna. Frágreiðingin “Eik í 2010” er eitt uppskot frá Jørn Astrup Hansen, sum hvørki táverandi nevnd ella grannskoðan kundi standa inni fyri.

Skrivið “Eik 2010” er eitt uppskot sum Jørn Astrup Hansen gjørdi til nevndarfundin hin 22. februar 2011, soleiðis sum hann ynskti at støðan átti at sæð út. Í framhaldi av hesum gjørdi Jørn Astrup Hansen eisini eitt uppskot til leiðslufrágreiðing. Av fundarfrágreiðingini frá nevndar-

Avrit frá kvf.fo

fundinum sæst, at Jørn Astrup Hansen hevði ynski um at almannakunngerða frágreiðingina. Av fundarfrágreiðingini sæst eisini, at víst varð á, at henda byrjunarfíggjarstøða munandi víkti frá tí fíggjarstøðu sum TF Holding hevði fingið fyrilagt í samband við gjøgnumgongdina av Eik Banka. Heldur ikki skilti nevndin hvussu niðurskrivingar vórðu fluttar frá 4. ársfjórðingi 2010 til 3. ársfjórðing 2010 og soleiðis fluttar frá einum felag til eitt annað felag. Táverandi nevnarformaður mælti til, at man ikki kundi nýta hesa uppseting fyrr enn grannskoðanin hevði átekna eina uppgerð. Grannskoðanin kundi ikki átekna uppgerina hjá Jørn Astrup Hansen og sæst hetta eisini av uppskotinum hjá Jørn Astrup Hansen.

Talan er um eina roknskaparuppgerð, sum ikki er í tráð við galdandi lóggávu og sum heldur ikki bleiv góðkend av hvørki nevnd ella grannskoðarum.

Viðmerkingin hjá KvF um at frágreiðingin ongatíð var almannakunngjørd, eftir ynski frá TF Holding, er bert partvíst sonn, tí at TF Holding átti ikki meirilutan í nevndini um ta mundið – tað gjørdi Finansiel Stabilitet. Tískil átti Finansiel Stabilitet avgerðarrættin um hvørt frágreiðingin skuldi almannakunngerast ella ei.

12 Sí punkt 11. Eingin – uttan Jørn Astrup Hansen – vil kennast við frágreiðingina. Eik Banki skal við hesum heita á KvF um at senda fyrispurning til Finansiel Stabilitet, um tey vilja kennast við frágreiðingina sum officielt skjal frá táverandi leiðslu.

13 Skjalið, sum KvF leggur við sum fylgiskjal 7, er enn skriv frá Jørn Astrup Hansen, sum inniheldur brot frá ymsum notatum og einari meting (ella vón) frá Jørn Astrup Hansen. KvF velur av onkrari orsøk hevja skjalið til lógarkeldu.

Eik Banki hevur – eftir upprunaligu kæruna til KvF – staðfest at skjalið er sent núverandi nevndarformanninum í Eik Banka. Hetta broytir tó einki um metingina hjá okkum av skjalinum. Skjalið er tó framvegis ikki at finna í skjalagoymslu bankans.

Viðgerðin hjá KvF av hesum skjalið er eitt tað besta dømi uppá at eingin kelduviðgerð verður gjørd av KvF, so leingi keldan eitur Jørn Astrup Hansen. Um Jørn Astrup Hansen hevur skrivað eitt skjal, so er innihaldið í tí pr. definitión rætt, tykist logikkurin hjá KvF at vera. Sum áður nevnt, so ber ikki til bara at skriva eitt notat um skattastøðuna í einum felagið, og so verður skattastøðan so sum notatið sigur. Soleiðis er veruleikin ikki – heldur ikki fyri Jørn Astrup Hansen.

14 Heldur ikki her vil KvF viðgera kæruna, men verjir bert sína egnu útsøgn. Eik Banki kærir ikki støðuna ella metingina av skattligu viðurskiftunum, sum fyrsta leiðsla bankans hevði. Tað støðuna má táverandi leiðsla hjartans fegin hava. Kæran gongur uppá at KvF í sendingini sigur: *"Men onkuntíð í 2011 ella 2012 broytti bankin støðu og fór at ganga beint ímóti teimum skattligu treytunum, sum bankin eina ferð hevði góðtikið"*. Bæði útsøgn og svar frá KvF er beinleiðis møsn, og ger einki annað enn at villleiða hyggjaran. Sí eisini punkt 9 omanfyri.

15 Fundarfrágreiðingin frá 13. marts 2013 staðfestir at Henrik Barner *"var enig"*. Tískil er umsetingin hjá KvF, at Henrik Barner "staðfesti", beinleiðs skeiv.

Avrit frá kvf.fo

16 Eik Banki byrjaði við kr. 2 mia. í eginpeningi. At uppgerðin av eginpeninginum, eftir uppruddingina í nýggja bankanum, seinni varð rættað til góða kr. 1,5 mia. er roknskaparteknikkur. Sí punkt 10.

17 Talan er um skeiva upplýsing, tí at støðan í bæði Fionia Bank og Eik Bank Danmark 2010 A/S var á leið tann sama. Eisini her seldi Finansiel Stabilitet partabrøvini, eftir at hava flutt ymisk engagement úr feløgunum.

Tað er tó áhugavert at lesa í svarinum frá KvF at: *" Í mun til gamla Eik Banka fór Fionia Banki sostatt ikki á húsagang. Og tað er ein avgerandi munur í hesum sambandi. Tá eitt felag fer á húsagang og verður avtikið, fella allir møguligir skattafrádráttir ella rokningar burtur. Men í mun til gamla Eik Banka, fór Fionia Bank ikki á húsagang, og tí kundi nýggi eigarin av Fionia Bank, Nordea, brúka skattafrádráttirnar í Fionia Bank"*. Hetta er áhugavert, tí at gamli Eik Banki (skrás. nr. 3293) fór aldrin á húsagang, men var tvangsavtikin tann 15. september 2011. Og ein tvangsavtøka førir ikki til at konkursreglarnar verða settar í gildi fyri tað felagið. Tað man so merkja, sambært KvF, at Eik Banki hevur rætt til skattafrádráttin.

18 KvF tilskilar sær rættin at gera eitt "value judgment" av um nevndarlimir eru vorðnir hóttir ella "noyddir við høðrum ágangi ella ræðingum".

Eitt "value judgment" – sum KvF velur at umseta til "eina sakliga meting" – verður av Merriam-Webster Dictionary lýst sum "*a personal opinion about how good or bad someone or something is*" og av Oxford English Dictionary "*An assessment of something as good or bad in terms of one's standards or priorities*". Ein saklig meting er júst tað: ein saklig meting. Eitt value judgment er persónliga metingin hjá skrivandi journalistinum. Hon kann gott vera saklig, men er tað ikki pr. definitión.

Orðingin, sum KvF grundar sítt "value judgment" á, er hendan: *"Endelig kunne der på det foreliggende grundlag være tale om ansvar for bestyrelsen ikke at begære fradrag i skatten, hvis banken har ret til det"*. Við hesari orðing, metir KvF seg vera í stand til koma til tað niðurstøðu, at nevndarlimir eru vorðnir hóttir ella "noyddir við høðrum ágangi ella ræðingum".

KvF var ikki til staðar í nevndarhølinum tá ið orðini fullu. KvF hevur einki grundarlag at siga at ein "hóttan" (óansæð hvørja definitión hjá Sprotanum tú brúkar) er gjørd. Talan er um eina fakliga niðurstøðu, tí um eitt felag hevur rætt til t.d. ein skattafrádrátt, so kann nevndin ábyrgdast, um nevndin ikki, í minsta lagið, fær greiðu á um felagið hevur rættin ella ei. Hetta er partur av ábyrgdini sum ein og hvør nevndarlimur hevur. Nevndin hevur eina skyldu at tryggja kapitalgrundarlagið í tí felagnum man situr sum nevndarlimur í.

Eik Banki hevur 10 vitni, sum kunnu staðfesta at orðini fullu sum ein faklig upplýsandi niðurstøða – og einki annað.

Upplýsingin frá KvF er skeiv, og er hvørki saklig ella undirbygd. Orðingin er ein roynd at reingja veruleikan, so hann passar til "søguna" hjá KvF.

Avrit frá kvf.fo

19 KvF skrivar í sínum svarið til Eik Banka: ”*Tað er eitt faktum, at Súni Schwartz Jacobsen er stjóri í TF-Holding, sum eigur Eik Banka. Sum stjóri í TF-Holding er Súni Schwartz Jacobsen fastur skrivari í øllum setanarbólkum til nevndarsessir í TF-samtakinum*”.

KvF hevur rætt í tveimum fakta: at Súni Schwartz Jacobsen er stjóri í TF Holding og at TF Holding eigur Eik Banka. Restin passar heilt einfalt ikki.

Tað eru tveir setanarnevndir í TF Holding samtakinum. Ein er Tilráðingarbólkurin hjá Umboðsráðnum, sum hevur til uppgávu at skjóta upp kandidatar til nevndarsessir í TF Holding. Súni Schwartz Jacobsen var eitt tíðarskeið skrivari í hesum bólkinum, men tað eru 2 ár síðani. Skrivarin í bólkinum hevur hvørki atkvøðu- ella talurætt.

Seinni bólkurin er ”Nomineringsudvalget” í Eik Banka, sum er ein lógarkravd setanarnevnd, sum arbeiðir eftir fastløgdum rammum, sum eru settar m.a. av lóg um fíggjarligt virksemi. Súni Schwartz Jacobsen er ikki partur av hesi nevnd.

Tað er nevndin í TF Holding, sum velur nevndarlimirnar í Eik Banka. Hetta verður gjørt eftir innstilling frá Nomineringsudvalget í Eik Banka. Tískil er tað ikki rætt at siga, at Súni Schwartz Jacobsen situr yvir nevndini í Eik. Hetta er ein misskiljing av partafelagsreglum og ókunnleiki um lóg um fíggjarligt virksemi.

20 KvF sigur ikki í sendingini, at tað *eru* fleiri feløg í TF Holding samtakinum við fleiri nevndarsessum. KvF sigur at ”*…tað er ein hópur feløgum við nógvum gyltum nevndarsessum...*”. Og tað er tað sum kært verður um. Hetta er at gera ov nógv av (við vilja) og gevur eina reingjandi mynd av veruleikanum.

21 Enn einaferð velur KvF at verja sína egnu ”søgu”, heldur enn at viðgera kærupunktið. Svarið frá KvF vísur eisini týðiliga hvussu samantvinnað argumentatiónin hjá Jørn Astrup Hansen og KvF er. KvF er týðiliga tengt at sínari keldu, tí at argumentatión ber somu fakligu feilir.

Eik Banki sendi TAKS báðar javnar. Bæði tann pr. 30. september 2010 og tann pr. 1. februar 2011. KvF ger eina (skeiva) fakliga niðurstøðu, sum, sjálvt um hon ikki var skeiv, ikki hevði havt tær fylgjur, sum KvF sigur. Hetta er tískil prógv fyri at KvF er ov tengt at sínari keldu, tí hetta eru somu fakligu feilir, sum verða endurgivnir.

Eik Banki setur ikki spurningar við almenna roknskapin hjá bankanum. Hví tað stendur sum tað ger í roknskapinum, er greitt frá omanfyri – sí m.a. punkt 10. TAKS bað um – og fekk – báðar javnar, tí at teir mettu tað neyðugt fyri heildarmyndina. Hvønn javna TAKS skal leggja til grund, veit TAKS væl – í mótsetning til Jørn Astrup Hansen.

22 Barbara Holm undrast ikki yvir, hví Eik Banki ikki lýsti málið betur fyri TAKS. Barbara Holm ger í sendingini eina niðurstøðu um hvat TAKS hevur fingið upplýst og ikki. Barbara Holm ger eina niðurstøðu um hvat eru týðandi upplýsingar og hvat átti at verði givið TAKS og nær.

Avrit frá kvf.fo

Barbara Holm veit ikki hvat fyri upplýsingar Eik Banki hevur givið TAKS ella nær. Hon hevur heldur ikki fakligt grundarlag fyri at meta um hvat eigur at vera latið inn, ella hvat er týðandi upplýsingar.

KvF hevur ábyrgdina fyri hesum útsøgnum, smg. § 18, stk. 2, í lóg um fjølmiðlaábyrgd.

23 Eik Banki skal ikki lesa sínar egnu nevndarfrágreiðingar so bókstaviliga, heldur KvF. Fíggjareftirlitið, ið hevur eftirlit við Eik Banka, deilir ikki metingina hjá KvF. Tað ger lóg um fíggjarligt virksemi heldur ikki, og heldur ikki Eik Banki.

Nevndarfrágreiðingar eru løgfrøðiligt galdandi skjøl, ið nýtast sum grundarlag fyri eftirlitið við bankunum. Nevndarfrágreiðingar verða eisini nýttar sum grundarlag í rættarmálum, har nevndarlimir kunnu ábyrgdast. Fíggjareftirlitið hevur beinleiðis krøv fyri hvussu slíkar fundarfrágreiðingar skulu gerast.

Tískil er tað rein undanførsla frá KvF, tá ið KvF umber seg við at talan er um eina "journalistiska endurgeving". Talan er um eina skeiva og reingjandi endurgeving.

24 Bæði upplesturin í sendingini og rættingin hjá KvF er skeiv.

Í einum banka er ein innanhýsis grannskoðari. Hann kann hava starvsfólk knýtt at sær, sum eisini eru grannskoðarar, men tað er bert ein teirra, ið ber heiti innanhýsis grannskoðari.

Uppsøgnin hjá einum starvsfólk í innanhýsis grannskoðanini hevur einki við hetta mál at gera, og KvF hevur yvirhøvur einki grundarlag at knýta uppsøgnina við hetta mál. Tað er eisini órættvíst fyri viðkomandi starvsfólk.

Presiseringin hjá KvF skuldi gjørt omanfyri standandi greitt, men tað valdi KvF ikki at gera.

25 Talan er ikki um villleiðing frá Súna Schwartz Jacobsen. Í ringast føri er talan um misskiljing millum spurning og svar.

Í maj 2013 skriva grannskoðarar bankans, at teir meta at talan kann vera um skattligan good-will. Í marts 2014 skriva grannskoðarar bankans eitt nýtt notat, men tað er ikki rætt at har stendur at tapið ikki kann dragast frá. Orðaljóðið er: "*Derfor kan man ikke uden videre konkludere, at underbalancen i dette tilfælde repræsenterer goodwill for den nye bank.*"

Tað var ikki fyrr enn í januar 2016 var, at grannskoðanin ikki metti tað vera rætt, at bankin innroknaði skattaaktivið, sum TAKS hevði givið bankanum rætt til. Tað var tað, sum sipa var til í samrøðuni við Dag og Viku.

26 Talan er um høpisleysa viðmerking frá KvF, ið einki annað endamál hevur enn at sverta stjóran í bankanum til. Annars kann vísast til punkt 25 beint omanfyri.

27 Tað er ójavnvág í viðgerðini, tí at KvF tekur bert sjónarmið fram, sum KvF heldur stuðlað teirra egna sjónarmiðið. Her nýta vit orðið "halda", tí at KvF bæði feil- og yvirtulkar sínar egnu keldur.

Avrit frá kvf.fo

KvF vísur í svarið sínum á, at KvF eftir sendingina hevur "*fingið tilfar, sum vísur á uppaftur fleiri fráboðanir, sum Eik Banki/TF-Holding fingu longu í oktober 2010, um at tapini og ein møguligur skattafrádráttur hoyrdu til gamla Eik Banka og Fíggjarligt Støðufesti*".

Hvørki nýggi Eik Banki ella TF Holding hava móttikið nakrar "fráboðanir" um at virðistapið og ein møguligur skattafrádráttur hoyrdu til gamla Eik og Finansiel Stabilitet. Eik Banki og/ella TF Holding hevur møguliga fingið onkrar metingar, ið siga at Eik Banki ikki hevur rætt til ein skattafrádrátt, men tað er og verður ikki annað enn metingar. Líkasum metingin hjá Eik Banka er, at bankin hevur rætt til ein skattafrádrátt. Hvør meting er røtt, er eina og aleina upp til TAKS, sum myndugleika, at avgera, og í seinasta lagi hjá dómsvaldinum.

Harafturat skal viðmerkjast, at tað bert eru tveir persónar, sum alment, útyvir KvF og Sosialin, hava sagt at virðistapið hoyrir gamla bankanum til. Hesir eru Jørn Astrup Hansen og Odd Bjellvåg. Hvørgin teirra er óheftur í hesum málið, men óansæð hvør hevur sagt tað, so ber tað snøgt sagt ikki til. Tað ber ikki til at flyta og bóka tap tvørturum tvær løgfrøðiligar eindir.

Tað kann væl vera at tað ikki kann krevjast at KvF hevur løgfrøðiliga servitan á øllum økjum, men tá man dregur og miðlar niðurstøður, ið eru beinleiðis ólógligar, so má man bera ábyrgdina fyri at hetta ikki er kanna nóg gjølla.

28 KvF hevur ikki eitt prógv fyri villleiðing av hvørki TAKS ella almenningi. Tað hevur KvF ikki, tí tað finnast einki prógv, tí eingin villleiðing – onnur enn tann frá KvF – er farin fram. Alt svarið frá KvF er ein undanførsla.

29 KvF leypur í sendingini – og í sínum svarið – eina týðandi millumrokning um. Fyri at rundskriv nr. 7 frá 10. november 1998 skal koma til brúks, so er neyðugt at § 139 í skattalógini er brotin. Tvs. eitt lógarbrot skal vera framt.

§ 139 í Skattalógini er soljóðandi:
***"§ 139.*** *Tann persónur, sum við tí í hyggju at sleppa undan at gjalda skatt til tað almenna greiðir rangt frá ella á annan hátt gevur villeiðandi upplýsingar at fara eftir, tá ið avgerast skal, um ein persónur er undir skattskyldu ella at nýta, tá ið skattskyldug inntøka ella skattaútrokning verður ásett, verður revsaður fyri skattasvik við sekt, varðhaldi ella fongsli upp í 2 ár.*
***2. stk.*** *Er misbrotið framt av stórum gáloysni er revsingin sekt ella, tá ið talan er um skerpandi umstøður, varðhaldi."*

Áðurnevnda rundskriv sigur heilt ítøkiligt:
"*Er lógarbrotið framt við vilja, og tann landsskattaupphædd, sum skattgjaldarin er sloppin sær undan, tilsamans er meira enn* ***100.000 krónur****, kann málið tó ikki verða avgjørt fyrisitingarliga, men skal verða sent ákæruvaldinum til viðgerðar."*

KvF velur at gera tað niðurstøðu, at tað bert eru tveir møguleikar, hóast at úrslitiðmongdin er nógv størri enn 2.

Harafturat velur KvF, hóast tey hava lisið rundskrivið, ikki at taka við at lógarbrotið skal vera framt við vilja. Beinleiðs villleiðing av øllum hyggjarum.

Avrit frá kvf.fo

30 Eik Banki heldur fast í sínum upprunaligu kærupunktum. KvF viðger ikki kærupunktið, men velur enn einaferð at verja seg sjálvan. Tað er ikki endamálið við kæruviðgerð.

31 Tað er rætt at eingin frá Eik Banka vildi gera samrøðu til sendingina. Eisini er tað rætt, at Eik Banki ikki hevur verið serliga hugaður at gera samrøður við KvF yvirhøvur. Gjøgnumgongdin omanfyri vísur greitt hví. KvF hevur aldrin havt nakran áhuga í, hvat Eik Banki veruliga hevði at siga. "Vinkulin" hjá KvF var valdur frá byrjan, og málið varð bert lýst úr hesum "vinkulið".

Eik Banki vildi tó fegin svara spurningum frá KvF skrivliga. Eik Banki fekk spurningarnar frá KvF leygardagin 14. mei 2016, og svaraði hesum spurningum tann 17. mei 2016. Ikki eitt svar frá Eik Banka varð viðgjørt ella tikið við sum sjónarmið í sendingini. Í staðin varð skrivið frá Eik Banka lagt á heimasíðuna hjá KvF, men heldur ikki hetta varð viðmerkt í sendingini. KvF vísti ongan áhuga ella nakra roynd at fáa svarini frá Eik Banka fram til almenningin.

**SAMANUMTØKA**

Eik Banki hvørki vil ella roynir at gera seg inn á, skerja ella á nakran hátt avmarka rættin hjá KvF ella tess journalistum at gera kritiskan journalistik. Eik Banki metir "fjórða statsvaldið" hava avgerandi týdning fyri samfelagið, og metir tað vera eina uppgávu og skyldu hjá journalistum at avdúka, varpa ljós á og lýsa týðandi samfelagslig mál og at viðgera hesi kritiskt. Tað má tó vera eitt grundleggjandi krav, at tann kritiska viðgerðin verður framd sakliga, óheft og við einari virðing fyri faktuella sannleikanum – ikki metingum hjá einkultpersónum.

"Skattamálið" livir tíanverri ikki upp til hesi krøv. Sendingin er ikki ein journalistisk viðgerð av einum torskildum málið, men er heldur ein upplestur av einari søgu, sum KvF hevur fingið fortalt. Einari søgu, sum KvF valdi at trúgva, og nú ikki torir at ásanna ikki var sonn. Søgan varð teimum sannførandi fortald, men kritiska viðgerðin av keldum, og kanska serliga tí tilfarið, sum keldur hava lagt fram, hevur verið vantandi.

Skattamálið hjá Eik er í roynd og veru ein faklig ósemja millum grannskoðarar, sum TAKS, sum myndugleiki á økinum, er biðið um at taka støðu til. So einfalt kann málið lýsast. Alt hitt er grugg.

Um so er at Fjølmiðlanevndin sær tørv á at málið verður lagt fram fyri nevndini munnliga, er Eik Banki til reiðar til tess.

Avrit frá kvf.fo

**FYLGISKJØL**

Bilag 1: Byrjunarjavni pr. 1. oktober 2010
Bilag 2: Javni pr. 1. februar 2011.

Vegna Eik Banka

Súni Schwartz Jacobsen
*Forstjóri*